## DAGSINS MEINING

# Stýring

Stýring ella manglandi politisk stýring av vinnulívinum er eitt støðugt afturvendandi evni í almenna orðaskiftinum. Hetta orðaskiftið snýr seg fyri tíðina sum heild um trý evni: royndirnar hjá landsstýrinum at fáa Fiskavirking at lata virkið upp í Vági, fiskin, sum fer ótilvirkaður av landinum og so stuðul ella ikki stuðul til rækjuvinnuna. Atfinningarnar móti landsstýrinum tróta ikki og koma hesar serstakliga frá búskaparfrøðingum og frá arbeiðsgevarasíðu.

Atfinningin móti uppíleggingini í Suðuroy gongur mest uppá hetta, at nú er politiska stýringin á veg innaftur í flakavinnuna. Tað er torført hjá landsstýrissamgonguni at verja seg móti hesari atfinning. Her standa reint búskaparlig liberal sjónarmið móti reint politiskum sjónarmiðum. Tað má vera legalt, at landsins stýri roynir at minka um hóparbeiðsloysið í einum øki í landinum. Hetta hevur einki við politiska stýring av vinnuni at gera. Hetta er, so segði maðurin vanlig "common sense". Alt annað vildi verið ábyrgdarleyst. Landsstýrið eigur tí ikki at bakka fyri trýstinum. Verður bakkað, svíkur landsstýrið sunnaru helvt av Suðuroy, og tað kann samgongan ikki liva við. Ein annar spurningur er so, hvussu hetta skal verða gjørt.

Løgmaður hevur eisini verið úti við teimum politisku signalfløggunum við atliti at fiskaframleiðsluni á landi og øllum problematikkinum kring feskfiskavinnuna. Hetta fall ikki í góða jørð hjá arbeiðsgevarunum. Tað má tó vera loyvt landsins løgmanni at siga sína meining. Her er talan um eitt tilfeingi, sum vit øll eiga. Tað má vera bæði rætt og rímiligt, at politiska leiðsla landsins meldar út við einum politiskum ynski um, at felags tilfeingið verður gagnnýtt á ein hátt, sum gagnar flest fólkum sum mest. Vinnan noyðist at endurskoða sínar strategiir við atliti at teimum stóru broytingum, sum henda innan alt, sum eitur feskfiskaframleiðsla. Tað skal meira til enn at fokusera uppá lønarlagið. Her er tørvur á nýhugsan og áræði at ganga nýggjar leiðir. Skálaberg verkætlanin er eitt sera gott og eggjandi dømi um hetta.

So er tað rækjuvinnan. Javnaðarflokkurin hevur tikið støðu og avgerð kann tí verða tikin í málinum. Heimurin fer ikki av lagi, um tað almenna fer inn og hjálpir rækjuvinnuni í eitt avmarkað tíðarskeið. Tað almenna kann ikki sita hendur í favn, meðan ein heil vinna fer fyri bakka. So einfalt er tað. Men hetta má gerast á ein hátt, so vit ikki enda aftur í studningsbúskapinum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Einskiling av tí almennu jørðini

**Zakarias Wang**



Eitt mál, ið alt ov leingi hevur ligið á láni í Føroyum, er at fáa einskilt ta jørð, sum tað almenna eigur, men onnur arbeiða.

Tað almenna er fyrst og fremst landsstýrið, sum stendur sum eigari av helvtini av øllum markatalinum í Føroyum. Men nakrar kommunur eiga eisini jørð, og fremst teirra millum er Tórshavnar kommuna, sum í sínari tíð fekk Álaker.

Tíbetur er ein partur av tí almennu jørðini einskildur. Hetta er hent við tað at fólk hava fingið loyvi til at lagt inn traðir, ein og grundstykki eru seld.

Traðirnar eru lagdar inn sum leigutraðir, og tá leigarin hevur velt tær undan, hevur hann, vísandi til tað arbeiði, hann hevur lagt í jørðina, fingið trøðna til keyps.

Men ein annar bólkur er av leigulendingum, sum ikki hevur nakran møguleika fyri at fáa jørðina til keyps uttan mun til hvussu nógv arbeiði hann hevur lagt í hana.

Her er talan um kongs bøndurnar.

Í seinastuni hava myndugleikarnir eisini táttað í møguleikarnar hjá øðrum leigulendingum at fáa jørðina til keyps. Dømi eru um, at undanveltar traðir eru afturtiknar, Havnar kommuna sýtir fyri at selja traðir og kolonihavar til leigararnar, og traðir, sum verða seldar, fáa álagt fullkomuliga órímiligar treytir sum at tær t.d. skulu lata jørð uttan endurgjald til slík endamál sum myndugleikarnir annars skuldu ognartikið til.

Hvat er endamálið við at fara so illa við teimum, sum hava arbeitt jørðina og tí áttu at verið teir einastu, sum skuldu átt hana?

Hetta er ein gáta, men spyrja vit teir politisku flokkarnar, so hava teir í skjótt hundrað ár verið heitir talsmenn fyri, at hesin órættur skal halda fram.

Hetta er hent, hóast øll vita, at tann skipan, vit hava í dag, er til ógagns fyri tjóð okkara. Vit liva í einari kapitalistiskari skipan, og fyri at fáa fyritøkur í lag krevst kapitalur. Vanligasti mátin til at fáa kapital til nýggjar fyritøkur er við at taka lán við trygd í jørð. Men í okkara landi er helvtin av jørðini almenn og tí deyður kapitalur, sum ikki kann nýtast sum trygd fyri nýggjum fyritøkum. Tað er at undrast yvir, at vit hava nakað vinnulív yvirhøvur undir hesum treytum, og at vit hava havt nakra framgongd, tá ið vit bert hava siglt við hálvari ferð.

Einskilja vit jørðina, lata vit hin vegin upp fyri tí møguleika, at okkara framburður fer at taka dik á seg.

Hetta skuldi verið eitt greitt endamál hjá øllum teimum, sum fáast við at stýra í einum landi.

Men nú er eitt kommunuval fyri durum, og ikki eitt orð hoyrist um, at teir sum stilla upp, vilja einskilja ta almennu jørðina, eitt mál, sum átti at verið meir átrokandi enn nakað annað.

# Aftursvar til Starvsmannafelagið

**Jógvan Jespersen**
*Útvarp Føroya*



Í Starvsblaðnum, sum varð sent limunum í Starvsmannafelagnum og fjølmiðlunum fríggjadagin, ger nevndin í felagnum greitt, at nú skal grein 4 í sáttmálanum haldast. Uttan undantak skulu nú øll størv lýsast leys - eisini fyribils- og avloysarastørv.

Útvarp Føroya verður drigið fram sum tann stóri syndarin. Tað er rætt, at tað er ikki ofta, at størv hava verið lýst leys seinastu árini. Hetta fyrst og fremst tí, at starvsfólkini hava støðast rættiliga væl.

Men tað er eisini rætt, at tað eru sett størv, sum ikki eru lýst leys. Tó ivist eg í, um ÚF er størri syndari enn aðrir almennir stovnar, og gjøgnum árini man ikki hava verið tann stóri munurin á ÚF og SvF. Umstøðurnar hjá hesum stovnum eru nú einaferð nógv øðrvísi, enn hjá einum vanligum almennum arbeiðsplássi.

Upp í syndaregistarið hjá ÚF, sum Starvsblaðið borðreiðir við, mugu eisini verða tald nógv styttri avloysarastørv, sum hava havt til endamáls betri at kunna ganga ynskjunum hjá starvsfólkunum um summarfrí á hásumri á møti, og at skapa størri fjølbroytni í arbeiðinum hjá føstu starvsfólkunum.

Vit hava bara livað í tí trúgv, at felagið hevur góðtikið hesa mannagongd. Ein av nevndarlimum felagsins er í starvi í ÚF, og tí hava vit tikið sum givið, at viðkomandi ella okkurt av álitisfólkunum gjørdi vart við seg, um felagið ikki góðtók ta mannagongd, sum hevur verið brúkt, og sum øll hava kent.

ÚF hevur ongan trupulleika við at halda tær treytir, sum Starvsmannafelagið nú setir í sambandi við starvssetanir. Hinvegin skal ein gera sær greitt, at fella tey stuttu avloysarastørvini burtur, ið verða brúkt sum kitt til at fáa eina torføra kabalu at ganga upp, so verða arbeiðsumstøðurnar hjá føstu starvsfólkinum samsvarandi verri.

Annars hava programmedarbeiðarastørv við jøvnum millumbilum verið lýst leys, so øll, sum hava ynski um eitt tílíkt starv, hava havt møguleika fyri at søkja, og koma við í metingina, tá starvið skal setast.

Stórt trot hevur verið á útbúgvnum og royndum journalistum seinastu árini, og síðst vit lýstu eitt starv leyst, sótu vit eftir við eini løgnari kenslu, tí ikki minni enn tveir umsøkjarar, sum fingu starvið boðið, søgdu síðan frá, at teir ikki ynsktu at taka við starvinum, tí nú høvdu teir fingið eitt betri tilboð frá sínum arbeiðsgevara. Tingini kunnu skoðast úr fleiri sjónarhornum.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Trongisvágsøgnin um frítíðarskúlan

**Jón Guttesen**
*Tvøroyri*

Beikst skal við søtum svølgjast, og hetta er søgnin um ein gamlan býráðslim á Tvøroyri ið hevði framt eina beistagerð. Hetta er søgnin um býráðið og borgastjórin ið høvdu hjálpt honum og ein einsamallan námsfrøðing sum ikki vildi kúgast. Beistagerðin er framd og friður ræður enn einaferð á Tvøroyri.

Tó, friður er tað ikki ið ræður eftir sovornað beistagerð. Heldur er tað tøgn ið ræður. Enn einaferð er órættur framdur, og tvørafólkið gongur sína dagligu gongd. Sær ikki og letist ikki sýggja henda órætt ið er framdur.

Kann verða at ein beiskur smakkur er í muðunum hjá teimum rættvísu, kann verða at sorg er at hóma í hjørtunum hjá teimum hjartagóðu. Men tøgn ræður tó.

So við eitt er eitt buldur á býráðsskrivstovuni. Tað er borgarstjórin ið er vaknaður og er dottin av stólinum. Námsfrøðingurin hevur gjørt vart við at óreglusemi, lógarbrot og órættur er farin fram, og býráðslimurin gamli er komin brestandi inn á borgarstjóran.

Hetta lata teir sær als ikki linda, og nú byrjar orrustan móti einsamalla námsfrøðinginum.

Býráðslimurin gamli eigur fleiri vápn og nú verða bæði tey størstu tikin fram: Slatur og Sley. Gjøgnum ár og dag hava hesi vápnini tant honum væl og vápnini skulu vísa seg at verða almikil enn eina ferð.

Fyrst skal Tvørafólkið sleppa at sýggja hesi almektigu vápn í nýtslu. Tvørafólkið er hampafólk og góðtrúgvi fólk og tá skot omaná skot verða latin av, hava Tvørafólkið ikki annað fyri, enn at trúgva hesum.

Og námsfrøðingurin sýnist bæði eitt og annað. Fyrst verður hann gjørdur til eina barnaetandi huldu og eitt skrýmsil á at líknað - ikki heilt ólík gamla býráðsliminum. Síðan verður hann gjørdur til eitt klandrivætti og hysteriskur sum eingin - ikki heilt ólík gamla býráðsliminum. Og til siðst verður hann gjørdur ógnaður til at leiða — ikki heilt ólík býráðslimunum.

Í meðan hevur Landsstýrismaðurin verðið og vitja okkara bý, hevur sett freistir trýggjar og latist verða øðiliga harmur og illur um málið alt.

Námsfrøðingarnir hava ressast, sett ryggsekk og guitar frá sær og hava stevnt Landstýrismanninum.

Tá hevur Landstýrismaðurin ikki annað fyri enn at talað at, og krevjað at rættlag kemur í okkara viðurskifti.

So nú eru menn ikki blíðir á býráðsskrivstovuni á Tvøroyri, nú teir hava fingið harraboð úr Havn.

Men vápnini hjá gamla býráðsliminum kunnu eisini nýtast á landstýrismenn.

Tí verður sama slatri og sleyðið nú latið í nýggjan ham. Nú eru tær haldgóðar og sakligar grundgevingar. Nú eru tær sannleiki og verða boðreiddar á landsins hægstu umsiting.

Tí søgnin er í dag ikki at enda komin, nú Landsstýrismaðurin sessast til borðs.

Men tað er eingin andsøgn í at eingin kemur heilur úr hesari søgnini, og at fáur vinnur á slatri og sleygi.

# Enn ein rokning fyri fullveldið

**Helgi Abrahamsen**



Uppskotið til fíggjarlóg fyri 2005, sum júst er lagt fyri Løgtingið, minnir okkum enn einaferð á, hvussu skaðilig fullveldisætlanin hevur verið fyri okkum føroyingar.

Alt skuldi vera so lætt í 1998. Vit fingu at vita, at nú høvdu vit "ein søguligan møguleika" at standa á egnum beinum. Heildarveitingin úr Danmark, skuldi ikki vera til nakra nyttu í Føroyum, og tí skuldi hon, saman við øðrum ríkisveit-ingum, avtakast. Hetta segði landsstýrið seg kunna gera uttan at neyðugt fór at verða við sparingum á fíggjar-lógini, og uttan at skattur og avgjøld fóru at hækka.

Uppskriftin var, at vit skuldu avtala eina skiftisskipan, har Danmark rindaði 500 mió. krónur í ár 2000, og síðani skuldi gjaldið minka burtur í einki. Í 2008 skuldi alt vera liðugt. Henda prosessin skuldi vera so løtt at gjøgnumføra, at meðan blokkstuðulin fjaraði burtur, skuldi skiftistíðin eisini brúkast til at útbyggja samfelagið á øllum økjum. Pengar fóru ikki at mangla.

**Skjótt hvønn vegin**

Men tað gongur skjótt hvønn vegin í føroyska búskapinum.

Hóast niðurskurðurin av ríkisveitingunum "bara" bleiv millum 1/3 og 1/4 av tí, sum upprunaliga var ætlað, so var hetta kortini nóg mikið til at stóra yvirskotið bleiv til undirskot. Fólk eru uppsøgd, tænastur eru skerdar og fleiri avgjøld eru eisini løgd á føroysku skattgjaldararnar. Í veruleikanum átti rokningin til Palleba at verið munandi størri, enn hon higartil hevur verið, men talið verður hildið niðri, við at politiski myndugleikin letur undirskot vera á fíggjarlógini. Harvið verður ein partur av rokningini útsettur til seinni.

Skuldu vit goldið alt undirskotið, og høvdu hinar 600 milliónirnar av heildarveitingini, umframt aðrar veitingar (einar 300 mió. krónur) nú verið vekk úr føroyska búskapinum, so hevði støðan hjá føroyingum verið katastrofal.

Tá vit so minnast til øll tey føgru lyftini, um at vælferðin skuldi ikki skerjast, skattir og avgjøld skuldu ikki hækka, og einki undirskot skuldi vera á fíggjarlógini, ja so mugu vit geva einum ávísum glyvramanni rætt, sum um dagarnar segði seg hava funnið heimsmeistaran í at manipulera.

**Veitslan er liðug**

Tann stóra "fullveldisveitslan" er nú liðug, og ein nýggj samgonga stendur eftir við "uppvaskinum". "Høvuðskokkurin" (Tjóðveldisflokkurin) hevur smoygt sær í andstøðu, og uttan iva fer hann teir komandi dagarnar, í sambandi við fíggjarlógarviðgerðina, at kritisera arbeiðið hjá teimum, sum í hesum døgum standa við hondunum langt niðri í uppvaskifatinum.

Rokningina fyri allar ørskapin fær Palleba. — Eisini tann Palleba, sum ongantíð trúði teimum føgru lyftunum um tað hálovaða fullveldið.

# Sambandsflokkurin fegnast

**Kaj Leo Johannesen**
*Sambandsflokkurin*



Tá tað ræður um okkara tilknýti til ES, so standa føroyingar ikki bara á síðulinjuni, men føroyskir politikarar hava eisini beinleiðis noktað fyri at umrøtt- og kunnað um spurningin. Men nú sær út til at vend er við at koma í.

Sambandsflokkurin kann ikki annað enn fegnast um, at Javnaðarflokkurin á landsfundi í farna vikuskifti hevði dirvi til at taka málið upp um ES-spurningin.

Føroyar eru bæði landafrøðiliga og søguliga ein náttúrligur partur av Evropa. Men hóast hetta, so eru vit í løtuni uttanfyri tað evropeiska samfelagið, og har gerast vit meira og meira eftirbátar. Tann globali samhandilin noyðir okkum, um vit vilja tað ella ikki, at taka kjakið upp um okkara støðu mótvegis ES, nú 95 prosent av føroyska útflutninginum fer til ES-marknaðin. Fleiri dygdargóð arbeiði eru gjørd fyri at finna aðrar loysnir enn fullan ES-limaskap (nevnast kunnu reyða- og bláa álitið), men enn standa vit á síðulinjuni.

Undanfarna samgonga legði stóran dent á at fáa ein handilssáttmála við Ísland, sum innihelt "tey fýra frælsini" (fría flyting av vørum, kapitali, arbeiðsmegi og tænastum). Í Íslandi búgva einans umleið 280.000 fólk, og tí mátti tað havt størri áhuga at gjørt ein líknandi sáttmála við ES, har 480.000.000 fólk búgva.

Skulu Føroyar menna seg við altjóðasamfelagnum, er alneyðugt at Føroyar hava tey 4 frælsini mótvegis ES. Sum støðan er í dag hava vit einki av hesum frælsunum.

Í november 2002 legði undirritaði uppskot til samtyktar fyri tingið, har heitt varð á landsstýrið um at koma við eini frágreiðing, ið lýsti fyrimunir og vansar við føroyskum ES-limaskapi. Frágreiðingin skuldi síðani vera grundarlag undir einum aðalorðaskifti um ein møguligan ES-limaskap. Men løgtingið feldi uppskotið við teirri grundgeving, at tíðin var ikki búgvin til at taka stig til eitt aðalorðaskifti í Løgtinginum um málið. Víst var á møguleikan, heldur at halda eina ráðstevnu um evnið.

Grunda á tað sjónarmiðið legði Lisbeth L. Petersen, vegna Sambandsflokkin eitt uppskot fyri tingið í farna ári, har tingið varð biðið um at heita á landsstýrið, um at gera júst so sum tingið sjálvt hevði mælt til í sambandi við fyrra uppskotið. Men heldur ikki tað uppskotið varð samtykt. Men nú hevur nýggja samgongan sæð týdningin av at halda eina ráðstevnu um ES, og fyrireikingarnar eru farnar í gongd.

Tað er sera umráðandi, at Føroya fólk fær eina kunning at taka støðu útfrá. Sambandsflokkurin fegnast um at aðrir flokkar nú eisini tykjast at vera opnir fyri at geva fólkinum hesa kunning.

# Áhugamálini hjá heildini fremst

**Jógvan Arge**
*býráðslimur*



Farandi valskeiðið hevur tíanverri verið eitt afturstig í býráðspolitikki í Havn.

Vit hava í fýra ár havt eitt stýri, sum hevur havt líka góðan hug at fremja einstaklingsáhugamál sum áhugamálini hjá heildini.

Hetta hevur havt hug til at útarta seg til vandalismu. Hevur ein byggisamtykt staðið í vegin fyri eini hovsaætlan, so eru byggisamtyktir við harðari hond skúgvaðar til viks og broyttar.

Tað vil siga, at tær reglur, sum vóru galdandi í gjár, eru ikki galdandi í dag. Slíkan ótryggleika um, hvørjum umhvørvi borgarnir búgva í, kann ein kommuna ikki bjóða fólki.

Býráðsmeirilutin broytti ta generellu byggisamtyktina fyri meginpartin av býnum soleiðis, at tey, sum hava hildið seg búgva í einum vanligum sethúsaumhvørvi, kunna vænta at fáa allar møguligar aðrar byggingar upp at sær, bara ein grønur blettur hómast eftir í grannalagnum.

Reglur, sum upprunaliga vórðu gjørdar til at skipa býin í einum ávísum samanhangi, eru bara strikaðar, og nú kanst tú vænta so at siga alt næstan allastaðni.

Farið er rættiliga harðliga fram í málum, sum snúgva seg um Tórshavnar Kommunu í framtíðini. Har hevur hvørki høgur ella lágur fingið ljóð.

Einhvør meining frá borgarum er kveistrað til viks. Hoyringarskyldan, sum kommunan hevur í slíkum málum, er bert eitt eiti og verður als ikki tikin í álvara av býráðnum sjálvum.

Gaman í fær tann borgari, sum dittar sær til at hava eina aðra meining í slíkum málum, sítt bræv framlagt á fundi, men tað er konsekvent við teirri tilráðing, at býráðið heldur fast við ta avgerð, sum tað frammanundan hevur tikið.

Vit í tjóðveldisflokkinum hava so mangan mælt til eisini at taka atlit til sjónarmiðini hjá borgarunum, men tað hevur í flestu førum verið sum at sletta vatn á gás.

Her má broyting koma í. Borgarnir skula í álvara takast við upp á ráð. Byggisamtyktirnar mugu gjøgnumgangast, og nýggja heildarætlanin fyri kommununa má endurskoðast, so betri javnvág verður í býarmenningini.

Tú hevur møguleika fyri stuðla upp undir broytingina á valinum 9. november.